## Sagt av týskarum:



*- Vit hava einki at vinna og alt at tapa, heldur Kahn*

Oliver Kahn, týski málverjin, sum verður roknaður millum teir allar bestu í heiminum, tykist dáma lítið at skula til Føroya.

- Vit hava einki at vinna og alt at tapa í einum slíkum dysti. Sjálvandi vita vit, at vit eru favorittar, og nú mugu vit vísa, at vit hava karakter til at bera hetta heitið, hevur Kahn sagt við týskar blaðmenn eftir Skotlands-dystin.



Rudi Völler, týski landsliðsvenjarin, ásannar eisini, at avrikini hjá Týsklandi ikki hava verið nóg góð higartil.

- Vit hava snøgt sagt ikki verið nóg góðir. Nú er stundin komin, at vit rinda fólki aftur fyri tað álit, sum tey hava sýnt okkum, sigur Völler.

- Tað er bara sigurin sum telur. Alt annað er líkamikið, heldur formaður í týska fótbóltssambandinum. Hann eitur Gerhard Mayer Vorfelder. Víðari sigur hann tó, at tað verður ikki lætt, men stigini eru týdningarmikil.



*Tað var ikki annað enn uppiborið, tá skotar javnaðu. Her hevur 23 ára gamli Miller júst runnið seg ígjøgnum verjuna og sent bóltin framvið Kahn. Ein mynd, sum vit gjarna síggja aftur á Tórsvølli mikudagin*

*Mynd: Reuters*

# Týskarar á knøunum

**Týskarar fingu neyðuga stigið við sær úr Skotlandi, men tað var ikki meira enn akkurát, og í øllum førum avdúkaðu skotar nakrar veikleikar hjá komandi føroysku mótstøðumonnunum**

SKOTLAND-TÝSKLAND
*Jákup Mørk*

Talan varð um ein sera spennandi dyst, tá komandi mótstøðumenninir hjá Føroyum úr Týskallandi vóru á vitjan hjá Skotlandi.

### Skelkaðir um móttøkuna

Fyri skotska landsliðsvenjaran, Berti Vogts, vakti dysturin helst serligar kenslir, nú hann sum kunnugt hevur venjari hjá týskarum í drúgt áramál, og tað var eisini sjónligt, at hann hevði megna at lyft bæði leikarar og áskoðarar sínar til ein dyst av teimum heilt stóru.

Sambært týskarum sjálvum, so vóru teir skelkaðir mest sum alt fyri eitt, tá teir komu inn á leikvøllin. Kenda Tartan-army hjá skotum hevði veruliga fyrireikað seg til stóra slagið, og trýstið frá mannamúgvuni mundi kennast inn á vøllin, og her høvdu skotar eisini yvirtakið.

Týskarar megnaðu snøgt sagt ikki at koma nær námind skotska málinum fyrstu longu løtuni, men fyrstu ferð vandi var á ferð, kostaði tað eisini. Torsten Frings sendi bóltin innfyri, og her sýndi Fredi Bobic, at hann í øllum førum er ein harri, sum ansast skal eftir, tá hann kanónstútaði bóltin í kassan.

Ein skuldi kanska hildið, at hetta fekk skotarnar at setast meira afturá, men tað var júst tað, sum ikki hendi. Heldur settu teir enn meira trýst á týska liðið, sum als ikki fekk sítt spæl at koyra, men einamest mátti hugsa um at rudda fyri egnari hurð. Tvær ferðir var eisini um reppið, at týskarar javnaðu, men fyrst megnaði Jens Jeremias at rudda tætt inni undir málinum, og seinni skeyt Steven Crawford framvið úr góðari støðu.

### Uppborin javnleikur

Eftir steðgin helt alt fram í sama lag. Skotar trýstu og trýstu, og týskarar høvdu alsamt verri við at fylgja við ferðmikla spælinum. Ikki minst 23 ára gamli Kenny Miller, sum higartil hevur havt ein hampuliga anonyman leiklut í næstbestu ensku deildini við Wolverhampton, gjørdi um seg. Fleiri ferðir vóru verjuleikararnir um ein háls av kviku driblingum hansara, men tað átti tó at verið liðfelagin, Colin Cameron, sum skuldi havt javnað. Hetta eftir at Stephen Crawford fyrst hevði roynt seg við skoti, sum Kahn bert fekk blokerað, men tá hann síðani stútaði tvørtur um til ein púra leysan Cameron, rakti hesin ikki so mikið sum bóltin.

Tað var kanska líkt til, at Týskland enn einaferð skuldi vinna ein tepran sigur, tí hóast støðugt trýst, so byrjaðu skotsku møguleikarnir at fækkast. Dramatikkurin var tó framvegis í hásætinum, og bæði Michael Ballack og Christian Dailly vóru hepnir bert at fáa gult kort, tá Ballack at enda var vorðin væl og virðiliga irriteraður av støðugu mansverjuni frá West-Ham leikarunum. Men 20 minuttir fyri leiklok, fekk Miller áskoðarafjøldini at geyla gleði sína út um alt Glasgow. Camoron tók sær skjótt av einum frísparki, og áðrenn týska verjan hevði skipað seg, hevði Miller smoygt sær ígjøgnum og sent bóltin inn um ein sakarsleysan Oliver Kahn í málinum.

Týskarum so vant, so reistist liðið nakað seinastu minuttirnar, og við nakað av hepni, so kundu teir kanska eisini fingið eitt avgerandi mál, men hóast bæði Schneider og Wörns vóru nær við, so vildi hetta helst verið ov mikið av tí góða.

Tí týskarar spældu als ikki nakran góðan dyst. Ikki minst mundi tað koma dátt við, at leikararnir á liðnum høvdu somikið ilt við at fylgja við ferðini á skotska spælinum. Nakað sum týsk lið annars aloftast væl eru før fyri.

Hinvegin skerst ikki burtur, at javnleikurin í hesum dystinum í sjálvum sær ikki er nakað vánaligt úrslit fyri Týskland, og kunnu teir so fáa trý stig til høldar í Føroyum, so munnu Völler og hansara menn vera líka glaðir um, hvat áskðarar og tíðindafólk halda. Fyri týskar professionellar er tað aloftast úrtøkan sum telur, og so leingi Týskland hevur kós móti endaspælinum, er alt annað helst líka mikið í teirra hugaheimi.

**Skotland – Týskland 1-1 (0-1)**

0-1: Fredi Bobic, 23
1-1: Kenny Miller, 70
Skotland: Douglas - Ross (75. McNamara), Pressley, Webster, Naysmith - Devlin (61. Rae), Lambert, Cameron, Dailly - Crawford, Miller (90. Thompson)
Týskland: Kahn - Friedrich, Worns, Ramelow - Rau (57. Freier), Schneider (86. Kehl), Jeremies, Ballack, Frings - Klose (75. Neuvill



Der Kaiser, Franz Beckenbauer:

# -Dysturin ímóti Føroyum verður torførari enn Skotlandsdysturin






*Franz Beckenbauer ávarar týska landsliðið, um ikki at verða ov hástórir til uppgávuna ímóti Føroyum, tí so kann tað lættliga ganga galið, sigur keisarin við týska blaðið Bild*

**Hetta er størsti dysturin hjá føroyingum nakrantíð, og tí mugu týsku leikararnir hava rætta hugburðin til dystin, tí føroyingarnir fara at berjast fyri lívinum, sigur Franz Beckenbauer við týska blaðið Bild.**

FØROYAR-TÝSKLAND
*Páll Holm Johannesen*

Sum vanligt, so eru fyrrverandi týsku stórleikararnir, frammi í týsku fjølmiðlunum undan landsdystinum ímóti Føroyum. Tann størsti av teimum øllum, Framz Beckenbauer, er mánadagin í Bild,og sigur sína hugsan um landsdystin ímóti Føroyum. Keisarin ger sínum landsmonnum greitt, at dysturin í Føroyum má vinnast, og at alt annað er ein stór skomm.

– Dysturin ímóti Føroyum verður torførari enn ímóti Skotlandi, tí føroyingar renna og berjast altíð fyri søkini, og tí fara vit hava trupulleikar at spæla fótbólt, sigur Keisarin.

Franz Beckenbauer metir tað verða av stórum týdningi, at týsku leikararnir hava rætta hugburðin til dystin, tí annars kann tað lættliga enda galið.

– Okkara leikarar mugu ikki verða hástórir, tí fyri føroysku lærararnar, elektrikkarnar og krambakallararnar er dysturin tann størsta avbjóðingin nakrantíð, og tí mugu vit verða klárir,tí allir føroyingarnir fara at gera sítt ítarsta, sigur fyrrverandi stórleikarin.

Beckenbauer harmast, saman við øllum týskarum, um avrikini hjá týska landsliðnum, síðan HM-kappingina í Japan og Suður Korea í fjør.

– Lykilin til góðu úrslitini í HM-kappingini var, at vit vóru kropsliga væl fyri, men tað er ikki nóg mikið. HM er ein kapping yvir ein mánað, og tá kann ein koma langt við at vera væl fyri kropsliga, men nú spæla vit 1-2 dystir hvørja ferð, og tá mugu hava aðrar eginleikar, enn bara teir kropsligu, og teir eginleikarar manglar okkara lið í løtuni, sigur Franz Beckenbauer at enda.

# Týskarar óttast føroyska landsliðið

**Fyrrverandi stórleikarin, Paul Breitner, sigur seg skilja væl, um týska landsliðið eru bangnir fyri dystinum ímóti Føroyum.**

FØROYAR-TÝSKLAND
*Páll Holm Johannesen*

Tað verður dúgliga skrivað í teimum stóru týsku bløðunum undan landsdystinum ímóti fótbóltsdvørginum Føroyum. Felags fyri flestar greinarnar er, at týskarar eru bangnir fyri føroyska landsliðnum.

Eftir vánaliga avrikið í Glasgow, har Týskland bert fekk javnleik ímóti Skotlandi, eru týskarar á einum máli um, at týska landsliðið er ikki tað sama, sum tað hevur verið.

Í Welt am Sonntag, sigur fyrrverandi Bayern Munchen og Barcelona venjarin, Udo Lattek, at týska landsliðið ikki hoyrir millum tey bestu liðini í heiminum longur. – Vit spæla vánaligan fótbólt í løtuni, og eftir avrikið leygardagin, hava vit alla orsøk at ótta dystin ímóti Føroyum mikudagin, sigur Udo Lattek við týska blaðið.

Fyrrverandi stórleikarin, Paul Breitner, sum skeyt mál bæði í HM-finaluni í 1974 og 1982, gevur eisini ilt av sær. Fyrrverandi miðvallarin á týska landsliðnum, sigur seg væl skilja, um týska liðið eru bangnir fyri dystinum í kvøld.

– Tað hevur síðan HM-kappingina í fjør verið ein stórur niðurtúrur hjá týska landsliðnum, og avrikið ímóti Skotlandi var eitt vána ávrik, og nú eru vit noyddir at óttast dystin ímóti Føroyum, sigur fótbóltsviðmerkjarin á Frankfurter allgemeine Zeitung, Paul Breitner.

## Visti tú at:

Í 58 EM-undankappingardystum hevur Týskland:

6 tap, 13, javnleikir og ikki færri enn 39 sigrar. Seinasta tapið var 10. oktober í 1998, tá teir taptu 1-0 fyri Turkalandi.

Hjá Rudi Völler er talan um 39. dystin sum landsliðsvenjari

Higartil hevur talan verið um 22 sigrar, 8 javnleikir og 9 tap

Í dag eru 346 dagar síðani, at Týskland leikti HM-finalu í Yokohama, men sambært týsku miðlunum tykist hetta vera nógv longri síðani enn so.

# Týskarar tykist spentir

Týska landsliðið hevði tíðindafund beint fyri døgurða týsdagin, áðrenn liðið fór til Føroya. Á hesum tóktist tað greitt, at bæði leikarar og venjari tykjast hava virðing fyri føroysku mótstøðuni. Kanska bara vanligt kurteisi, men í týsku pressuni siga tey seg nú gera seg til reiðar til stórslakt, um liðið ikki kemur heim við nøktandi úrsliti.

Hvørt hetta so er gott ella ringt fyri Føroyar, er ilt at gita, tí ofta hevur tað verið júst undir slíkum umstøðum, at týskarar hava fingið bestu úrslitini, men tað er í øllum føurm hugaligt at síggja, at Føroyar í alheimsins eru vaksnar nakað, síðani byrjanina á altjóða pallinum, og í øllum førum eisini síðani oktober mánað í fjør.

**- jm**

**Sagt á tíðindafundinum hjá Týsklandi týsdagin:**

**Rudi Völler:**
Føroyar hava víst móti Íslandi, hvussu sterkt liðið er. Teir spæla eina perfekta 4-4-2, og tað er imponerandi, hvussu teir megna at spæla slíka skipan, og samstundis standa somikið væl í verjuni.

Vit mugu tí geva alt tað, sum vit hava í samfullar 90 minuttir.

**Miroslav Klose:**
Einasta eg veit er, at teir hava eina rúgvu av seyði, og at bakgrundin á myndunum er full av fjøllum.

**Ballack:**
Teir spæla eins og skotarnir, og tí mugu vit geva alt tað, sum vit hava.

**Tyski DfB forsetin:**
Ballack skuldi hugsa meira um spælið, og ikki tosa negativt um liðfelagar sínar. Hann skuldi heldur sett spurnartekin við egna avrikið, og ikki siga, at alt tað, sum hann hevur gjørt er gott, ella bara geva einum skaða skuldina.

Næsta ár mugu vit í minsta lagi røkka hálvfinaluna í EM-kappingini.